Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinir Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Treytir til útlendska arbeiðsmegi

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin umrøtt møguleikan at seta treytir viðvíkjandi revsiváttan og samfylgjandi familju til útlendska arbeiðsmegi?
2. Um ja, nær kann væntast, at hesar treytir verða settar?

Viðmerkingar:
Vit hava í fleiri ár havt stóran tørv á arbeiðsmegi í føroyska samfelagnum. Tí hevur verið neyðugt at innflyta arbeiðsmegi, ið hevur verið til gagns fyri okkara vinnulív.

Tó hevur tað ikki verið uttan avbjóðingar. Í løtuni kann útlendsk arbeiðsmegi koma her, uttan at man biður um eina revsiváttan frammanundan. Søgur í miðlunum hava tíverri víst, at fólk við kriminellari fortíð í teirra heimlandi eru komin til Føroya.

Eisini er møguligt hjá útlendskari arbeiðsmegi at fáa samfylgjandi familju hendanvegin. Tann, ið kemur inn uppá arbeiðsloyvi, skal fylgja nøkrum treytum, men tað eru ikki nøkur serlig krøv til ta samfylgjandi familjuna, tað vil siga maka og børn. At tað kunnu koma nógvir tilflytarar til landið uttan serligar treytir hevur sínar avbjóðingar, tí tað er við til at seta trýst á ymsar vælferðartænastur, eitt nú skúlaøkið.

Føroyar eru eitt lítið samfelag, ið eisini er viðbrekið, og tí mugu vit altíð vera á varðhaldi. Tað kann eitt nú gerast við at seta treytir.

Undirritaði hevur fyrr sett landsstýrismanninum fyrispurning um at seta treytir til útlendska arbeiðsmegi, og tá svaraði landsstýrismaðurin, at hann fór at umrøða møguleikan við danska ráðharran á økinum.

Fyri at vita, um man hevur umrøtt hetta, og um væntast kann, at treytir fara at verða settar, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 22.mai 2025

Beinir Johannesen